# FCK helt tætt fyri fjórðu ferð á rað

**Todi Jónsson sat smáskaddur í Keypmannahavn, meðan liðfelagarnir vunnu 1–0 í Odense, og nú tykist glið vera komið á hjá Brøndby**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

FCK er framvegis oddalið í superliguni. Sunnudagin vunnu teir 1–0 í Odense ímóti OB. Harvið megnaði eykamálverjin, Rune Pedersen, at halda tætt fyri fjórðu ferð á rað. Magnus Kihlsted er framvegis skaddur, og nú heldur eykamálverjin, at avrikini hjá honum leggja upp til, at hann ikki bara soleiðis uttan víðari verður skiftur út, tá svenski málverjin verður tøkur aftur.

Todi Jónsson var ikki við í Odense. Sambært heimasíðuni hjá felagnum var hann smáskaddur. Í álopinum vóru Peter Møller og Jörgen Pettersson. Teir høvdu ikki nógvar royndir ímóti málinum, og í 2. hálvleiki skoraði svenski álopsspælarin, sum sunnudagin fylti 27 ár, einasta málið í dystinum. Uppleggið átti Thomas Røll í vinstru, og nú hevur Pettersson skorað tvær ferðir upp í slag.

Zuma var ikki serliga eyðsýndur í høgru, og tá Jörgen Pettersson noyddist at fara av vøllinum, tí hann var skaddur, varð Zuma fluttur í fremstu røð.

Hetta var fjórða ferðin á rað, at OB ikki megnaði at gera mál.

### Herverk í fleiri førum

Fríggjakvøldið tapti AGF á heimavølli 3–1 ímóti Viborg. Søren Frederiksen skoraði tvey mál og lyfti seg harvið upp á máltindin.

Bæði í hesum dystinum, og tá Brøndby sunnudagin var í Farum, gjørdu áskoðararnir so nógv um seg, at løgreglan noyddist at leggja uppí, og fleiri vórðu handtikin bæði í Århus og í Farum. Eftir at tað ítróttarliga hevur gingið sum eftir ánni í superliguni higartil í ár – enn er eingin dystur endaður við javnleiki – verður harmast nógv um hetta.

Á vøllinum í Farum legði heimaliðið seg á odda beinanvegin, og teir hildu leingi tørn ímóti Brøndby. Men so vísti breiddin seg at vera størri hjá gestunum, og tá Kasper Dalgas skoraði sigursmálið var talan um mál av nett sama slag, sum tá Kurt Mørkøre skoraði sigursmálið ímóti HB í Klaksvík fyrr í summar.

Tað er ikki so langt síðani, at Michael Laudrup og Brøndby vóru í kreppu. Nú hava teir vunnið tríggjar dystir á rað, og Brøndby er komið tætt upp undir oddaliðini.

### Fíggjarliga illa sperdir

Silkeborg hevði vitjan av Esbjerg. Heimaliðið hevur leingi verið illa spert fíggjarliga. Í vikuni, sum fór, kendu spælararnir seg noyddar at fara 25 prosent niður í løn. Á vøllinum hevur tað eisini verið sera soltið. Hesa ferð høvdu teir vitjan av Esbjerg, og úrslitið var 1–1.

Í AB stendur tað heldur ikki væl til fíggjarliga. Teir vóru í Ikast, og har var úrslitið eisini 1–1.

Í Køge hildu teir 75 ára føðingardag. Spælið var einki at siga til, men AaB fór avstað við øllum stigunum, tí teir vunnu 2–0. Annað málið var sjálvmál, og heimaliðið hevði størsta partin av tíðini meiri spæl og fleiri møguleikar. Men tað eru málini, sum telja.

## Danska superligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK | 10 | 6 - 2 - 2 | 15 | 13 | 2 | 20 |
| 2 | AaB | 10 | 6 - 1 - 3 | 15 | 12 | 3 | 19 |
| 3 | Brøndby (M) | 10 | 5 - 2 - 3 | 21 | 12 | 9 | 17 |
| 4 | Esbjerg | 10 | 4 - 3 - 3 | 23 | 21 | 2 | 15 |
| 5 | Farum | 10 | 5 - 0 - 5 | 15 | 16 | -1 | 15 |
| 6 | Viborg | 10 | 3 - 4 - 3 | 20 | 19 | 1 | 13 |
| 7 | OB (S) | 10 | 4 - 1 - 5 | 16 | 16 | 0 | 13 |
| 8 | AB | 10 | 3 - 3 - 4 | 12 | 14 | -2 | 12 |
| 9 | AGF | 10 | 3 - 3 - 4 | 14 | 17 | -3 | 12 |
| 10 | FCM | 10 | 3 - 3 - 4 | 14 | 17 | -3 | 12 |
| 11 | Køge | 10 | 3 - 1 - 6 | 16 | 21 | -5 | 10 |
| 12 | Silkeborg | 10 | 2 - 3 - 5 | 9 | 12 | -3 | 9 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

## Danska 1. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Randers F. | 10 | 7 - 1 - 2 | 26 | 15 | 11 | 22 |
| 2 | Herfølge | 10 | 7 - 1 - 2 | 24 | 14 | 10 | 22 |
| 3 | Vejle | 10 | 6 - 2 - 2 | 16 | 10 | 6 | 20 |
| 4 | Ølstykke | 10 | 4 - 4 - 2 | 22 | 21 | 1 | 16 |
| 5 | Brønshøj | 10 | 4 - 3 - 3 | 14 | 10 | 4 | 15 |
| 6 | Frem | 9 | 4 - 3 - 2 | 18 | 16 | 2 | 15 |
| 7 | B 1913 | 10 | 4 - 2 - 4 | 17 | 18 | -1 | 14 |
| 8 | B93 | 10 | 4 - 1 - 5 | 16 | 15 | 1 | 13 |
| 9 | Fredericia | 10 | 3 - 4 - 3 | 11 | 12 | -1 | 13 |
| 10 | HFK Sønderj. | 10 | 3 - 3 - 4 | 24 | 24 | 0 | 12 |
| 11 | Skjold | 9 | 3 - 2 - 4 | 12 | 11 | 1 | 11 |
| 12 | FC Aarhus | 10 | 3 - 1 - 6 | 14 | 18 | -4 | 10 |
| 13 | B 1909 | 10 | 2 - 3 - 5 | 16 | 21 | -5 | 9 |
| 14 | AC Horsens | 10 | 2 - 3 - 5 | 14 | 19 | -5 | 9 |
| 15 | Hvidovre | 10 | 2 - 3 - 5 | 11 | 21 | -10 | 9 |
| 16 | HIK | 8 | 2 - 0 - 6 | 5 | 15 | -10 | 6 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Atli Gregersen (Randers Freja),
Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

## Norska tippeligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rosenborg (M) | 23 | 15 - 4 - 4 | 49 | 27 | 22 | 49 |
| 2 | Molde | 23 | 14 - 4 - 5 | 40 | 19 | 21 | 46 |
| 3 | Lyn | 23 | 14 - 4 - 5 | 33 | 24 | 9 | 46 |
| 4 | Viking | 22 | 9 - 10 - 3 | 39 | 25 | 14 | 37 |
| 5 | Odd. Grenl. | 23 | 11 - 4 - 8 | 32 | 26 | 6 | 37 |
| 6 | Stabæk | 23 | 10 - 6 - 7 | 36 | 28 | 8 | 36 |
| 7 | Våleranga | 23 | 6 - 10 - 7 | 31 | 28 | 3 | 28 |
| 8 | Sogndal | 23 | 8 - 4 - 11 | 32 | 43 | -11 | 28 |
| 9 | Lillestrøm | 23 | 7 - 6 - 10 | 29 | 29 | 0 | 27 |
| 10 | Bryne | 23 | 7 - 5 - 11 | 33 | 36 | -3 | 26 |
| 11 | Bodø/Glimt | 23 | 7 - 4 - 12 | 33 | 38 | -5 | 25 |
| 12 | Brann | 22 | 7 - 3 - 12 | 29 | 41 | -12 | 24 |
| 13 | Moss | 23 | 6 - 5 - 12 | 29 | 39 | -10 | 23 |
| 14 | Start | 23 | 2 - 5 - 16 | 21 | 63 | -42 | 11 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)

# Christian Høgni á viðvøllinum

**Vejle er framvegis væl við í stríðnum at vinna sær sætið aftur í superliguni**

1. DEILD DANMARK
*Jóannes Hansen*

Annan mikudag fer landsliðið til Litava og so til Týskalands. Um álopið fer at verða myndað við somu manning, sum tað var ímóti Skotlandi, so verður Christian Høgni Jacobsen annar av fremstu monnunum.

Trupulleikin hjá Christian Høgna og harvið landsliðnum er, at Vejle venjarin síðani landsdystin ímóti Skotlandi hevur brúkt føroyska spælaran á fleiri plássum, men hann hevur ikki verið í álopinum.

Christian Høgni hevur verið vongverji fleiri ferðir, og tá Skjold úr Keypmannahavn sunnudagin var í Vejle, var Christian Høgni Jacobsen allar 90 minuttirnar á miðvøllinum.

Vejle vann 2–1. Í álopinum vóru Jerry Brown og Michal Blom, og tað vóru teir báðir sum í 9. og 49. minutti løgdu Vejle framum 2–0. Gestirnir minkaðu ikki um munin fyrrenn í 89. minutti. Átta ferðir var gula kortið á lofti, men tað rakti ongantíð Christian Høgna.

Randers Freja og Herfølge eru oddalið. Við 22 stigum eru tey tvey stig frammanfyri Vejle. Næstu liðini eru fýra stig niðanfyri Vejle.

Randers liðið var heppið á heimavølli, tá teir í síðsta minutti skoraðu sigursmálið ímóti B1913. Ølstykke, sum leingi var ímillum tey fremstu, tapti á heimavølli 3–1 ímóti nýggja oddaliðnum, Herfølge.

HFK Sønderjylland var fyri ikki so langari tíð síðani í superliguni. Teir hava droymt um at sleppa aftur upp hagar, men tað gongst striltið. Sunnudagin taptu teir 3–2 í Odense ímóti B1909. Nú er HFK Sønderjylland tíggju stig frá uppflytingarplássi, og teir eru bara trý stig frá niðurflytingarplássi.

Hvidovre er illa fyri í botninum. Sunnudagin megnaðu teir ikki meiri enn málleysan javnleik á heimavølli ímóti Fredericia. Horsens, sum hevur Johan B. Hansen á liðnum, tapti hesa ferð 2–1 á Eysturbrúgv ímóti B93, sum higartil í hesum kappingarárinum hevur staðið seg betri, enn teir gjørdu í fjør, tá teir støðugt vóru í niðurflytingarvanda.

# Molde bíðar eftir Rosenborg

**Men hóast spælið ikki hevur verið nakað at reypa av, so bendir alt á, at felagið í Tróndheimi fer at vinna 11. meistaraskapin á rað**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Trý umfør eru eftir at spæla í norsku tippuliguni. Rosenborg er oddalið. Eftir stórtapið í Europa Cup kappingini ímóti Lyon mitt í síðstu viku vóru teir í Bodø, og har vunnu teir 4–1. Spælið var ikki frægari, enn tað var ímóti Lyon, verður sagt í norsku bløðunum, men tað tykist ikki bila. Stigini koma á konto, og harvið skal vilja illa til, um Rosenborg ikki um ein mánað ella so fer at standa við 11. meistaraskapinum á rað.

Um tað fer at kiksa hjá Rosenborg, so eru tvey lið klár at lofta meistaraheitinum. Annað er Molde, og hitt er Lyn. Tey eru bæði trý stig aftanfyri Rosenborg, og tað er longu greitt, at hesi liðini hava tryggjað sær rætt at luttaka í Europa Cup komandi summar. Tey eru níggju stig frammanfyri Viking úr Stavanger og Odd úr Skien.

Sunnudagin lyfti Molde seg uppum Lyn. Molde vann sannførandi 3–0 á tjóðarvøllinum Ullevaal í Oslo. Vålerenge legði rygg til stóra tapið.

Lyn meiri enn hálvkiksaði í Sogndal. Fyrrverandi føroyska felagið er so at siga sloppið undan øllum hóttanum um niðurflyting.

Lillestrøm hevur verið stóra vónbrotið í Noregi í ár. Tað varð roknað við, at teir skuldu vera við í NM kappingini, men alt kappingarárið hava teir hingið fastir í botnstríðnum. Sunnudagin megnaðu teir 1–1 á útivølli ímóti Stabæk.

Start úr Kristiansand er langt síðani flutt niður. Moss er næstaftast, og sunnudagin fingu teir eitt sindur av móti, tá teir í Kristiansand vunnu 6–1.

Í gjárkvøldið skuldu Brann úr Bergen og Viking úr Stavanger spæla.



B36-LÍF 0-0:

# Nullloysn í Gundadali

**B36 og LÍF býttu stigini sínamillum, hóast B36 spældi við tveimum í yvirtali seinasta korterið**

2. DEILD
*Hilmar Jan Hansen*



*Hóast teir seinasta korterið spældu við tveimum monnum í yvirtali, so megnaði B36 ikki at vinna á LÍF, og mistu teir tískil bronsukrónurnar í evstu løtu*

*Mynd: Jákup á Borg*

At tað ikki var tað stóra, sum í grundini stóð upp á spæl í Gundadali, sást eisini aftur í dystinum millum B36 og LÍF leygardagin.

Talan var ongantíð um gott og flótandi spæl, og tað var hipp sum happ, hvussu liðini skiftust um at hava yvirvág. Kortini megnaðu báðir partar at spæla seg fram til onkrar rættiliga góðar málmøguleikar, ið tó ikki blivu útnyttaðir.

Í seinna hálvleiki fekk LÍF tvær ferðir mann riknan av vøllinum, og í báðum førum var tað fyri at fáa seinna gula kortið. Men í roynd og veru var tað eftir hetta, at LÍF hevði sínar størstu kjansir í mótálopum, tá B36 trýsti og sendi tað mesta av sínum fólki longur fram á vøllin fyri at vinna dystin.

Tá alt kom til alt, endaði dysturin við málleysum javnleiki, og at liðini fingu eitt stig í part fyri avrikið, var á góðari leið hjá B36 og LÍF, sum endaðu á ávikavist fimta og sætta plássi. Men við teimum kjansum, ið vóru, kundi javnleikurin eins væl verið bæði 1-1 og 2-2.

**Dysturin í tølum**
**B36-LÍF 0-0**

Sumba-NSÍ 0-0:

# Mjørkaspæl á Krossinum

**Sumba tryggjaði sær rættin til framhaldandi spæl í deildini, og NSÍ skal spæla um upp- og niðurflyting móti B68**

2. DEILD
*Hilmar Jan Hansen*

Um tað var mjørkin, ið gjørdi tað, sigur søgan einki um. Men tá tað ráddi um at síggja mál og gott spæl í dystinum leygardagin á Krossinum millum Sumba og NSÍ, var sýnið einki serligt. Og í seinna hálvleiki sást bókstaviliga ikki úr øðrum endanum á vøllinum í hin.

Fyri bæði liðini ráddi um at sleppa undan at flyta niður, og hvørki teirra kundi kenna seg trygt. Sumbingar toldu ikki at tapa, um HB samstundis vann sín dyst í Klaksvík, tí so blivu sumbingar aftastir, og NSÍ hevði átt somu lagnu við tapi á Krossinum.

Dysturin var sum heild javnur, og ikki vóru teir nógvu málmøguleikarnir. Menn stríddust um hvønn einasta bólt, men misjavnt var, hvussu nógv fekst burturúr.

Sumbingarnir skutu dúgliga móti málinum hjá NSÍ, men høvdu ilt við at raka innan fyri málrammuna, og í hinum vóru ein tveir góðir møguleikar, ið tó einki góvu. Ta einu ferðina hevði NSÍ kortini bóltin í málinum hjá Sumba, men málið varð kolldømt.

Sostatt endaði dysturin 0-0, og tað merkir fyri Sumba, at við áttanda plássinum er framhaldandi tilveran í næstbestu deildini bjargað, meðan NSÍ á næstaftasta plássinum ikki kennir sína framtíðarlagnu í deildini, fyrr enn tvær grannauppgerðir eru fingnar frá hondini.

Næstfremsta liðið í 3. deild gjørdist B68, so tað verður ikki fyrr enn tveir upp- og niðurflytingardystir í næstum eru spældir millum toftamenn og runavíkingar, at greitt er, hvat av feløgunum hevur sína næstbestu manning í 2. deild næsta ár.

**Dysturin í tølum**
**Sumba-NSÍ 0-0**

# Unglingar á flog

**Teir báðir, Hans Kristian Simonsen og Martin Poulsen, vístu enn einaferð gott flog tá teir í royndu seg í stórari opnari kapping í spanska høvuðsstaðnum Madrid**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Talvferðin hjá evnaríku unglingunum hevur eydnast avbera væl. Í kapping í Barcelona myndaðu báðir toppin, og nú í Madrid gekst somuleiðis væl í kapping við navnframa heitinum; V Open Internacional de Ajedres VI Memorial Pablo Gorbea.

Hans Kristian Simonsen fekk ikki færri enn sjey stig av níggju møguligum móti nøkunlunda javnmettum mótstøðumonnum, meðan Martin Poulsen leingi fylgdi toppinum, men tapti seinasta talvið, sum gav honum hálvtsætta stig.

Tey mongu stigini Hans Kristian telvdi seg til, gav honum eitt deilt fjórða pláss, bert hálvt stig aftan fyri tríggir telvarar sum býttu fyrsta plássið. Millum hesar tríggjar eru tveir stórmeistarar, og tað sigur nógv um úrslitið hjá føroyameistaranum úr Kollafirði. 236 telvarar luttóku, harav nakrir stórmeistarar og fleiri altjóða meistarar. Martin Poulsen, sum í Barcelona fekk eitt deilt annað pláss millum 450 telvarar, bleiv nummar 47 í røðini.

Í seinasta umfarinum vann Hans Kristian á einum altjóða meistara (sum nú nærum kann kallast gerandiskostur hjá fremstu unglingum okkara), og talvið havi eg av góðum orsøkum valt at seta í blaðið í dag.

Felags fyri báðar er, at framgongdin heldur fram. Ratingin skolar inn, somuleiðis sum royndirnar á altjóða talvpallinum eru mennandi, serliga nú tá OL stendur fyri durðum.

### EM fyri unglingar

Martin Poulsen luttekur í EM fyri unglingar, sum somuleiðis verður telvað í Spania. Hann telvar í bólkinum fyri dreingir 18 ár og yngri. Telvað verður í døgunum 29. sept. — 08. okt.

Martin vann ímóti Shi Porat úr Ísrael (2369) í fyrsta umfari, og heldur tí fram har hann slepti. Heimasíðan er http://www.feda.org/european2002/menu.htm

# Nýggj føroysk talvbók!

TALV
*Tíðindaksriv*

Lær teg at telva. Eingin minni enn enski talvmeistarin Michael Basman, sum eisini er altjóða meistari, leggur lag á. Michael Basman byrjaði at telva sum tíggju ára gamal, og hevur hann telvað síðani. Eisini hevur hann tikið lut í nógvum olympiskum leikum. Seinastu tjúgu árini hevur hann burturav lært skúlabørn at telva, og í 1996 byrjaði hann UK Chess Challenge, sum er stór talvkapping, har fleiri túsund børn og ung taka lut á hvørjum ári.

Einfalt og lættliga leiðir hann unga lesaran inn í spennandi og avbjóðandi talvheimin. Í bókini lærir tú einføldu mannagongdirnar, frá byrjan til endatalv. Fotomyndirnar vísa stig fyri stig, hvussu tú skalt gera, frá fyrsta leiki til meira framkomið talv. Í bókini eru eisini brot úr talvsøguni, nakað um talvútgerð, og greitt verður frá endamálinum við spælinum. Orðalýsingar og svar og loysnir eru eisini í bókini. Martin Berg hevur týtt bókina úr enskum.

Bókin kann keypast í bókasølunum ella bíleggjast á www.bokasolan.fo

## Talvið hesa vikuna

**Hans Kristian Simonsen - IM Luis Manuel Perez (2384)**
**Madrid 2002 (9. umfar)**

1.e4 c5 2.c3 d5 3.exd5 Fxd5 4.d4 Ric6 5.Rif3 (ein varin, men oftani effektivur variantur í sicilionsku byrjanini) e6 6.Ria3 Fd8 7.Ric4 cxd4 8.cxd4 Bb4+ 9.Bd2 Bxd2+ 10.Fxd2 (d-finnan er isolerað, og hóast hetta er hon sterk) 10...Nf6 11.Rd1 0-0 12.Bd3 b6 13.0-0 Bb7 14.Rfe1 Rc8 (altjóða meistarin stillar fólkini væl til rættis) 15.Bb1 Rie7 16.Rice5 Fd5 (Álopið er hervið í gongd. Hans Kristian vil lokka svartan at vikna um kongastøðuna) 17.Fg5 h6 18.Fh4 Fb5 19.Rd2 (Torført er at bróta verjugarðin hjá svørtum, og sigast skal at ein feilur frá svørtu síðuni má til áðrenn hetta kann fremjast í verki) 19...Rfd8 20.Rde2 Rif5? (fyrsti feilur. Svartur hevur ikki sæð næstu leikirnir hjá álopsfýsna mótstøðumanninum) 21.Bxf5 exf5 22.Rixf7! Bxf3 [22...Kxf7 23.Re7+ Kg8 24.Rxb7 sum vinnur] 23.Re7 Bh5? (besti møguleiki var Bd5) 24.Rixh6+ Kf8 25.Rxg7! (støðan hjá svørtum er vónleys, og allir leikir tapa) 25...Fc6 [25...Kxg7 26.Fg5+ og svartur verður mátaður]



26.Fxf6+! Fxf6 27.Rg8# 1-0